## Trý skip landa í Sørvági

Í dag tekur Landingarmiðstøðin í Sørvági ímóti sløkum 300.000 pundum: Grímur Kamban, sum partrolar við Kallsevni, landar 120.000 pund, meginparturin er upsi. Kallsevni landar á Tvøroyri. Teir hava hendan túrin roynt á Bill Baily. Vesturskin kom á Sørvág í morgun, teir hava 150.000 pund, eisini hjá teimum er meginparturin upsi. Vestmanna-trolarin Skálafossur er eisini á Sørvági í morgun við 18.000 pundum, harav helmingurin er toskur



## Ann heldur fram árið út

Ann Dahl Hansen byrjaði í avloysarastarvi í Suðurstreymoyar Eystara Prestagjaldi í vár, og heldur nú fram í hesum starvinum árið út. Orsøkin til hetta er, at presturin, sum hon var avloysari fyri - Marjun Lómaklett - hevur sagt seg úr starvi frá 31. juli at rokna. Í Suðurstreymoyar eystara prestagjaldi eru tríggir sóknarprestar. Harafturat er sjúkrahúspresturin 10% sóknarprestur. Tað triðja sóknarprestastarvið varð upprunaliga skipað sum hjálp hjá dómpróstinum, ið hevur fyrisitingarligar uppgávur. Ann Dahl Hansen (myndin) hevur síðani 1. apríl røkt hetta triðja starvið, meðan Marjun Lómaklett hevur havt farloyvi. Marjun hevur nú sagt seg úr starvi, og tess vegna verður starvstíðin hjá Ann í samráð við kirkjuráðini longd hetta árið út, verður sagt úr Bispagarðinum

# Kravið um burðardygga veiðu kann útrudda fiskivinnuna

**Verður burðardygg veiða treyt fyri, at føroyskur fiskur kann seljast uttanlands, má vinnan fáa trygd fyri, at fiskifrøðingarnir hava rætt, sigur formaðurin í Reiðarafelagnum**

FISKIVINNA
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Í Sveis eru tær stóru handilsketurnar givnar at selja íslendskan tosk, tí handlarnir kunnu ikki fáa váttan frá íslendsku myndugleikunum fyri, at íslendska toskaveiðan er burðardygg. Avgerðin hevur tó ikki stórvegis avleiðingar. Sveis telist ikki millum teir stóru fiskamarknaðirnar, og tá sveisarar keyptu mest av toskavørum frá íslendingum, var nøgdin millum 2.000 og 3.000 tons.

Sveis keypir heldur ikki nógvan fisk úr Føroyum, men formaðurin í Ráfiskakeyparafelagnum, Símun Jacobsen, hevur kortini ávarað um, at føroyskur fiskur kann fáa trupulleikar á marknaðinum, um keypararnir ikki kunnu fáa váttan fyri, at føroyska fiskiveiðan er burðardygg, og eina tílíka váttan kunnu føroyskar fiskavørur ikki fáa í dag.

### Líkist grindarokinum

Formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Viberg Sørensen, heldur, at kravið um burðardygga veiðu er ógvuliga átøkt útlendska kravinum um, at føroyingar skulu gevast at drepa grind. Hann vísir á, at kravið um burðardygga veiðu kemur frá fólki inni á evropeiska meginlandinum, sum einki vita um fiskiskap, og sum ikki leggja í at spyrja seg fyri hjá teimum, sum eru í fiskivinnuni.

Formaðurin hjá reiðarunum vísir á, at fyri tey stóru londini so sum Bretland, Týskland og Frekland hevur eitt krav um burðardygga veiða ikki tann stóra týdningin, tí har er fiskivinnan lítið annað enn ein viðfángingur samanborið við hinar vinnugreinarnar.

-Men fyri fiskivinnutjóðir sum Ísland og Føroyar, sum hava fiskivinnu sum høvuðsvinnu, kann eitt tílíkt krav fáa ómetaliga stóra ávirkan, sigur Viberg Sørensen.

### Krevja trygd

Formaðurin í Reiðarafelagnum ásannar, at føroyskur fiskur kann fáa sama krav um burðardygga veiðu, soleiðis sum tann íslendski toskurin hevur fingið í Sveis. Hann heldur, at so hevur nvinnan bara ein veg at fara.

-So mugu vit fáa trygd frá fiskifrøðingunum fyri, at tað, sum teir mæla til, er tað rætta og tað einasta rætta, sigur Viberg Sørensen. Sjálvur ivast hann stórliga, og hann er í øllum førum ikki í iva um avleiðingarnar, fáa fiskifrøðingarnir sína vilja.

-Okkara fiskifrøðingar mæla til stóran niðurskurð, og ICES mælti til at steðga fiskiskapinum. Fáa teir sín vilja, verður fiskivinnan útruddað, og so er ikki neyðugt við krøvum kortini.



*-At krevja burðardygga veiðu er tað sama sum at krevja, at fiskifrøðin fær sín vilja, og so steðgar alt upp, sigur formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Viberg Sørensen*

## Sparikassar hækka rentuna

**Norðoya Sparikassi hækkar rentuna í dag, og rentan í Suðuroyar Sparikassa hækkar mikudagin**

Eftir at Tjóðbankin hevur hækkað rentuna, hava teir báðir sparikassarnir gjørt av at tillaga rentuna.

Við gildi frá í dag hækkar innlánsrentan í Norðoya Sparikassa 0,35 til 0,50 % fyri flest allar innlánskontur. Tó hækkar rentan á vanligari bók og fíggjarkontu ikki, meðan rentan á kapitalpensjónskonti hækkar við 0,60 %.

Útlánsrentan bæði lán og kredittir hækkar við 0,50 %. Rentuhækkingin umfatar ikki útlán og innlán, ið verða rentað í mun til Cibor rentuna. Aftan á hækkingina er rentan av heimláni 6,75 prosent, og rentan av bilaláni við 40 prosentum í útgjaldi er 7,75 prosent.

Samstundi broytir Norðoya Sparikassi nøkur tænastugjøld. Konstnaðurin fyri manuellar flytingar hækar við kr. 10,00 upp í kr. 20,00. Samstundis lækkar kostnaðurin fyri brævaflytingar úr kr. 10,00 niður í kr. 5,00. Somuleiðis verður gjald nú sett á kontoavrit send við posti og umsiting av fíggjarkonti.

Suðuroyar Sparikassi hækkar við virknaði frá mikudegnum 13. august rentuna á útlánum 0,35 prosentstig. Tó hækkar bíligasta bústaðarrentan bert 0,25%. Samstundis hækkar rentan fyri ávís innlán við uppsøgn og fyri eftirlønarkonti við upp til 0,40 prosentstigum.

Suðuroyar Sparikassi sigur, at orsøkin til rentuhækkanina er, at tað framvegis í dag er vorðið dýrari hjá peningastovnum virhøvur at fíggja síni útlán á heimligu og altjóða marknaðinum.

Aftan á broytingina er lægsta rentan fyri bústaðarlán í Suðuroyar Sparikassa verður soleiðis við virknaði frá 11. august 2008 6,75% p.a..